

*Tey spæla á dekkinum umborð á Barsskor til æru fyri myndamannin. Uttast vm.: Benjamin Isaksen á trompet; Sólbjørg Helena Joensen á kornett og Pætur Syderbø somuleiðis á kornett. Uttast hm. er Johan Høgnesen sum spælir trompet. Síðani eru tað Joan Isaksen sum spælir keyboard og at enda Ólavur Syderbø ið spælir urgu*

*Mynd: Bárður Lydersen*

### Tvey ljóðføri

Sólbjørg sjálv er rættiliga nýggj innan tónleikaheimin – ella tónleikavenjingina.

– Eg havi faktisk bara spælt kornett í ein og ein hálvan mánað. So eg eri akkurát byrjað, sigur hon, nú vit tosa við hana umborð á dekkinum á Barsskor.

Tað var kanska meiri tilvildin sum ráddi, at Sólbjørg fór at spæla eitt slíkt ljóðføri sum kornett.

Í veruleikanum ætlaði hon sær at læra seg at spæla eitt heilt annað slag av ljóðføri – eitt streingjaljóðføri.

– Eg teknaði meg til guittara, men tann tíðin eg fekk til venjing passaði so illa við siglingina hjá Barsskor.

– So eg helt, at eg kundi bara bíða til Sam byrjaði at sigla. Men so varð nóg mikið av næmingum, so nú standi eg á bíðilista til næsta ár. So spæli eg bara kornett meðan, sigur Sólbjørg, sum valdi kornettina, tí hon sá so spennandi út.

Enn veit Sólbjørg ikki um hon fer at halda fram við kornettini. Eftir summarfrítíðina fer hon so guittara í øllum førum at spæla guittara.

So fær hon at síggja, hvussu víðari verður.

### – Far út og spæl!

Eitt er at ganga til undirvísing í kornett so langt burtur frá heiminum.

Í Musikkskúlanum eru hølini jú gjørd til at kunna venja í. Men tað munnu vera tey fægstu heimini, sum hava ljóðdoyvdar veggir har ein tónleikari kann venja kornett, uttan at alt húsið hoyrir tað.

Hvussu er heima hjá Sólbjørg – hvat siga foreldrini til at hon spælir kornett og ikki eitt ljóðføri, ið heldur heldur minni gang?

– Mamma og babba, tey leggja einki í tað. Men beiggjarnir hjá mær – teir leggja nógv í tað.

– Hvat teir siga? Jú, teir siga, at eg skal spæla, meðan teir eru úti og spæla. Teir hava onkutíð hótt við at keypa trummur, og ætla sær so at spæla, meðan eg sjálv eru inni, sigur Sólbjørg og brosar við.

### Handil og børn

Húsar er ikki tann størsta bygdin í landinum. Men hóast fólkini eru fá, so er kortini eitt rættiliga stórt virksemi millum bygdarfólkið.

Sólbjørg er eisini ein teirra, sum er virkin í ymiskum virksemi í bygdini. Umframt sjálva venjingina av ljóðførinum og heimaarbeiðið úr skúlanum, og skótarnar í bygdini, so hevur hon eisini eina fastur í bygdini, sum hon vitjar rættiliga ofta.

– Hon hevur nøkur børn, og teimum dámi eg sera væl at spæla við. Hon hevur eisini ein handil, og har plagi eg eisini at hjálpa henni.

– So spæla vit eisini. Og nei, - eg keði meg so ikki, sigur Sólbjørg.



*Konsertin hjá Kvennakór Kópavogs í Christianskirkjuni sunnudagin hevði ein serliga lættan og altjóðakendan dám*

# Íslendskt kvinnukór við altjóða skrá

**Í út við tveir tímar undirhelt íslendska kvinnukórið Kvennakór Kópavogs við sera fjølbroyttari skrá í Christianskirkjuni sunnudagin**

KONSERT

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Íslendski vinarbýurin hjá Klaksvík, Kópavágur, hevur eitt av fremstu kvinnukórunum í Íslandi. Um vikuskiftið vitjaði Kvennakór Kópavogs í Føroyum, har tey høvdu konsert í Christianskirkjuni sunnudagin.

### Frá Beatles til Klaksvíkssangin

Kórið legði út við sanginum "Dagurin er risinn", ein íslendsk útgáva av kenda geliska lagnum, tey flestu munnu kenna best sum "Morning has broken" hjá Cat Stevens. Lætta lívsjáttandi lagið setti í stóran mun sín serliga dám á restina av konsertini, eisini røðina av tjóðarløgum, úr so ymsum londum sum Korea og Mexico, sum øll lutvíst vórðu sungin á sínum upprunamáli.

Skráin hjá kórinum var sum heild sera fjølbroytt við øllum frá katólskum sálmum og negro spirituals til Beatles og Jesus Christ Superstar. Og tað var ikki sørt forkunnugt at hoyra kend løg, sum eitt nú "Let it be" og "Bridge over Troubled Water" í íslendskari útgávu. Eisini kenda Lloyd Webber lagi "I don't know how to love him" var við í skránni í íslendskari útgávu, sungið av framúr góða sopraninum Sigríður Sif Sævarsdóttir.

Av øðrum kendum løgum kann nevnast hugtakandi lagið "Donna, Donna", sum tey flestu nokk seta í samband við fólkasangaran Donovan. Hesuferð hevði kórið valt at lata eina sekstett framføra lagið við kórinum í bakgrundini.

Samanumtikið ein sera fjølbroytt konsert við einum ógvuliga væl samansungnum kórið, sum als ikki aftraði seg við at royna seg við sangum á nógvum ymsum málum. Og sum eina serliga heilsan til áhoyrarnar hendan dagin sang kórið Klaksvíkssangin "Kvøða til Klaksvíkar" sjálvandi á føroyskum.

30 sangarar eru við í Kvennakór Kópavogs, sum verður stjórnað av hjúnunum Natalia Chow og Julina Hewlett, sum eisini hava klaverfylgispælið.

Formaðurin í pedagogfelagnum

# Fegnast um at arbeiðsfriður aftur valdar

**- Tað kennist sum ein stórur lætti, at arbeiðsfriður nú aftur er í nevndini, tí nógv stór mál standa fyri framman, sum krevja nógv arbeiðsorku, sigur formaðurin í pedagogfelagnum, Jarvin F. Hansen, eftir aðalfundin hjá felagnum leygardagin**

AÐALFUNDUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Við ársfrágreiðingini hjá formanninum í pedagogfelagnum, sum varð løgd fram á aðalfundinum leygardagin, er innanhýsis ósemjan í nevndini eisini løgd aftur um bak. Í frágreiðingini gjørdi formaðurin greitt, hvørja fatan hann hevur av tí, sum er farið fram, og aðalfundurin góðkendi frágreiðingina.

### Positivur fundur

Í ársfrágreiðingini greiðir formaðurin frá, at eftir hansara fatan er tað ikki uppgávan hjá nevndini í einum fakfelag at virka sum málsviðgerar og viðgera mál, sum hoyra heima í umsitingini hjá felagnum.

- Uppgávan hjá nevndini er fyrst og fremst at stinga ein fakfelagspolitikk út í kortið og royna at gera hugsjónirnar til veruleika. Hetta arbeiðið hevur sjálvsagt verið darvað av, at nevndin ikki hevur verið fullmannað, síðani tríggir limir tóku seg úr nevndini.

Innanhýsis ósemjan í nevndini var umrødd á aðalfundinum, men spældi ikki ein serliga stóran leiklut á fundinum, sum heldur var merktur av, at limirnir nú vilja hyggja frameftir.

- Fundurin var sum heild sera positivur, og eg havi avgjørt fatan av, at bæði limirnir og nevndin nú síggja fram til at fara til verka av nýggjum. Nógv stór mál liggja fyri framman, eitt nú sáttmálasamráðingarnar, sum krevja nógva arbeiðsorku, so tað er at fegnast um, at arbeiðsfriður nú aftur valdar í felagnum, sigur Jarvin.

Hann leggur afturat, at arbeiðið í nevndini eftir ætlan fer at verða skipað eitt sindur øðrvísi framyvir. Í løtuni eru tey til dømis við at skipa nakrar arbeiðsbólkar, sum millum annað skulu arbeiða við at fáa hagtøl til vega viðvíkjandi arbeiðsumstøðum og øðrum, sum ofta hevur verið frammi, men har tað sjáldan ber til at vísa á tøl, sum kunnu geva okkum eina greiðari mynd av støðuni.

### Javnstøða í nevndini

Av teimum umleið 1500 limunum í felagnum eru umleið 90 % kvinnur. Tí kann tað kanska undra, at meirlutin í nevndini nú er mannfólk. Spurdur um hetta fer at hava nakran týdning fyri arbeiðið í nevndini framyvir sigur Jarvin, at tað dugir hann ikki at ímynda sær

- Eg trúgvi, at okkara limir hugsa mest um, hvat tað er fyri ein politikkur tey vilja hava førdan, heldur enn um tað eru mannfólk ella, sum skulu gera tað. At mannfólk nú eru í meirluta í nevndini ger støðuna ikki so nógv øðrvísi, um vit samanbera við danska pedagogfelagið, har bara formaðurin er kvinna, meðan allir hinir nevndarlimirnir eru mannfólk. Tað er í øllum førum meir javnstøða í nevndini nú, tað er trý mannfólk og tvey konufólk, sigur formaðurin í pedagogfelagnum.

Í nevndini í pedagogfelganum sita nú Jarvin F. Hansen, formaður, umframt Leila Petersen og Maud W. Hansen. Jógvan Philbrow og Rógvi Fossadal eru nývaldir. Tiltakslimir eru Annika Djúrhus, Birita Lamba og Anja Egholm.